# Til Sólrun á 60 ára degnum



Tann 19. sept. 1948 bleiv Sólrun Hansen borin í heim á Toftum. Foreldur hennara vóru Jústines (Yddi) og Ella Hansen.

Sólrun er fjórðelst av 8 systkjum, 3 beiggjar og 5 systrar, og hon var elst av systrunum. Tá Sólrun var 1 ára gomul flutti hon saman við foreldrunum inn til Runavíkar at búgva.

Av tí at Sólrun var følld meinningartarnað, var hon ein av teimum, sum fór á stovn í Danmark sum 10 ára gomul, og búði hon næstan øll árini á Ebberødgaard og tey síðstu árini búði hon í Næstved.

Tey, sum ikki kenna Sólrun, undrast á, hví hon tosar mest danskt, men tað kemst av at hon tilsamans búði 21 ár í Danmark og tí er orðaforráðið hjá henni danskt/føroyskt.

Hon flutti heimaftur til Føroya á Eirargarð í 1979.

Sólrun prátar nógv og fylgir væl við í tí, hon sær og hoyrir í m.a. fjølmiðlunum.

Sólrun er komin aftur til heimbygdina Runavík og hevur bústað á Bústovni, har hon nú hevur verið í 23 ár. Sólrun trívist væl á Bústovninum og hevur sítt dagliga yrki á Verkstaðnum Stíggjur, har hon ætlar at halda sín 60 ára føðingardag sjálvan fríggjadagin 19. sept. kl. 19.00.

Við hesi føðingardagsheilsan vilja vit ynskja Sólrun hjartaliga tillukku við tí stóra degnum og ynskja henni nógv góð ár framyvir.

**Vit øll á Rúnarvegi**

## Andlát og jarðarferðir

**Helga Danielsen, Sørvágur** andaðist á Landssjúkrahúsinum týsdagin 16. september, 78 ára gomul. Kistan fer úr kapellinum á Landssjúkrahúsinum hósdagin klokkan 17. Jarðarferðin verður úr Sørvágs kirkju fríggjadagin klokkan 14. Tey, ið vilja minnast Helgu kunnu lata Sørvágs kirkju eina gávu.

Kistan við **Kristin Bærendsen**, sonur Sigurd og Sólvá Bærendsen í Skopun fer úr Landssjúkrahúskapellinum hósdagin klokkan 14. Suður við Teistanum klokkan 15:45. Jarðarferðin verður úr Skopunar kirkju fríggjadagin klokkan 14. Sungið verður úr sálmabókini.

# Føðingardagar



## Hjúnini Herbjørg og Eiler Egholm í Havn 85 ár

Tann 19. september fyllir mamma og tann 25. november fyllir babba 85 ár.

Góðu mamma og babba, verforeldur, omma, abbi, langomma og langabbi. Vit vilja ynskja tykkum hjartaliga tillukku við føðingardøgunum og alt gott framyvir.

Eisini vilja vit takka tykkum fyri tað, sum tit bæði altíð hava verið og eru fyri okkum. Góð og hjálpsom í allar mátar.

Føðingardagarnir verða hildnir saman leygardagin tann 20. september, og gleða vit okkum at heiðra tykkum bæði saman við familju, vinum og kenningum.

Øll eru hjartaliga vælkomin í Odd Fellowhúsi, Grønlandsvegur 56, frá kl. 12 til 17.

**Eyðna og Emi við familjum**

## Tøkk

Øllum teimum mongu, sum við blómum og gávum mintust meg, nú eg fylti níti fimm, takki eg hjartaliga.

**Janus Kamban**

**Dagurin**
**19. september. Constantia**. Kom upp í álmanakkan frá árinum 1700, men vit vita ikki, hvønn sipað verður til.

# Fimm ættarlið



*Á myndini eru: lítla Isabella Siri Davidsen, olduromman Elsa Margretha Frederiksen, langomman Anny Davidsen, omman Sunneva Davidsen og pápin Frank Davidsen*

Lesið Sosialin -so eru tit við!